# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Hebron á Argjum**
Sunnudag 24.2. Einki møti í Hebron vegna samkomulegu á Zarepta frá fríggjadegi 22. til og við sunnudag 24. februar. Mánadag 25.2. BeTwix fyri ung 5. - 8. flokk.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Pól Johannesen, evni: Guð og menniskja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti v. Ejvind og Duritu Mouritsen, Gentukórið syngur.
Møti sunnukvøld verður tulkað til enskt.
Barnaansing er undir møtinum sunnukvøld.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Sunnudagsskúli kl. 12. Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandavágur - Sjómanskvinnuringurin**
kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 21. feb. kl. 20. Bússirnar verða tømdar. Allar kvinnur eru hjartarliga vælkomnar.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 23.2. kl. 19. Talari: Hallur Sørensen.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Møtirøð í Saron, Vestmanna**
- byrjar hóskvøldið kl. 19 og heldur fram restina av vikuni.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli í kirkjuni, kl. 18 møti við Jóhannes Danielsen o.ø. úr Havn.

**Felagið Agape**
skipar fyri spennandi vikuskifti í Nesvík 29. februar - 2. mars. Sí lýsing í blaðnum.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
**Missiónsvika 20.-24. februar**
Hósdagin kl. 20 Møti v/ Marius Jacobsen. Manskór úr Kollafirði syngur.
Fríggjadagin kl. 20 Møti v/ Niels J. Nielsen, Gøtukórið syngur.
Leygardagin kl. 20 Møti v/ Gullak og Jónhildu. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta. Kl. 15 Familjumøti v/ Marion Poulsen, kl. 18 Møti v/ Tummas Dam og Hans Petur. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekka hvørt kvøld aftaná møtini. Bønarløta verður 1/2 tíma áðrenn hvørt møti.

**Eydnan á Oyrarbakka**
Sunnudagin 24. februar kl. 18 Møti, Hans P. Højgaard og Sigfred Johannesen og fl. tala, vitna og syngja. Øll eru vælkomin til møtini.

**Evangelisk møtir verða í Hæddini í Saltangará**
v/Hargar og Marianne v. fleiri
Fríggjakvøldið 22. feb. kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 20.
Á skránni er sangur, felagssangur, vitnisburður og tala.
Biðið verður fyri sjúkum og øðrum tørvum.
Kaffi verður aftaná.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur 21. feb. kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti – Glyvrapraise Lovsangur.
Sunnudagur kl. 17 Familjumøti v/Christian Joensen, Saltangará. Sangur: Barnakórið av Toftum.
Hugnaløta við drekkamunni aftaná.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl. 18 Tim5.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Frá Meinigheitshúsinum á Skála**
Missiónsvikan heldur fram
Hóskvøldið 21. febr kl. 20 John Petersen talar. Sangbólkurin Miktam syngur. Barnaansing.
Fríggjakvøldið kl. 19 Barna- og foreldramøti. Ranvá Langaard talar.
Barnakórið á Skála syngur.
Kl. 21 Ungdómsløta.
Leygarkvøldið kl. 20 Jógvan Fríðriksson talar. Glyvra streingjakór syngur. Barnaansing.
Sunnudagur kl. 11 Altargangsgudstænasta í kirkjuni við Jógvan Fríðriksson. Kl. 14.30 Barna- og foreldramøti Meinigheitshúsinum við trúboðarunum Jórun og Nurlan. Barnakórið á Skála syngur. Kl. 19 Niels J. Nielsen trúboðari talar. Effata syngur. Barnaansing.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.
Evni: Ungdómur og kynslív
Talari: Sverra Steinhólm, prestur.
Hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Lennart Fjell úr Svøríki. Sunnudagin kl. 17, Møti við Lennart Fjell. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagsskúli verður í kirkjuni sunnudagin kl. 11, og kl. 18 verður møti. Hilda Viderø tosar um evnið »Kynsligur ágangur«.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Hósdagin kl. 19 Juniorringur. Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti v/Andreas Andreasen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti.

**Kfum og Kfuk, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl.18 Møti við Pól Johannesen. Kl. 21 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 hevur Steen Palmqvist um evni »Vreiði«. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Jóel Bringsberg, Jórun & Debora syngja.
Sunnudagin kl. 18 er møti við Tummas Jacobsen. Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Hallgerð og Hendrik. Sunnukvøldið Onki møti… Vit luttaka á møtinum í Filadelfia í Havn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Hósdagin kl. 19.30 bindimøti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Fríggjadagin kl. 19 Sangvenjing.
Leygardagin kl. 14 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Einar Joensen.
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin kl 19.00 bøn. kl 20.00 streingjakórið.

**Bethel, Vágur**
Leygarkvøldið 23. februar kl. 21 Ungdómsmøti. Øll vælkomin.

**Missionhúsið Sumba**
Missionsvikan byrjar tórskvøldið 21. feb. kl. 20 Jógvan Højgaard talar. Mourits Viderø syngur.
Fríggjakvøldið 22. feb. kl. 20 Hilmar Bech talar.
Sumbiar kórið syngur.
Leygarkvøldið 23. feb. kl. 20 Ingolf Johannesen talar.
Kórið í Porkeri syngur.
Sunnukvøldið 24. feb. kl. 18 Árni Kjærbech talar.
Kórið á Tvøroyri syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 24. februar verður gingið: Kallanes - Hvítanes - Hoyvík. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00. Túrurin er heldur lættur, men onkrastaðni kann vera bratt, gingið verður umleið 3 tímar. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og kanska matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Felagið Tórshavn, náttartúrur**
Leygarkvøldið 23. juni verður farið til Skarðs. Túrurin er langur og tungur. Farið verður við bussi av Kunningarstovuni kl. 20. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir, ein heitan munn og góðan matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425/227039.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Fríggjadagur 22. feb.***
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grerhu Harlou
12.00 Døgurði
13.30 – 15.00 Opið hús
Tilhaldið verður stongt kl. 15.00 fríggjadag.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at **øll** skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
***Fríggjadagur 22. februar:***
*Boccia.*
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. .
***27. feb. Fara vit til Havnar at vera publikum til upptøkur av leivssjov. Vit fara úr Skopun kl. 8.10. Neyðugt er at tekna seg til túrin á tlf. 211921.***

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Kunningarstovan, Felagið Tórshavn**
Vaglið 4, Postboks 379, 110 Tórshavn.
tlf. 302425
torsinfo@torshavn.foa
www.visittorshavn.fo
Opið er má-fr kl. 11-17, ley kl. 10-13.

**Sandoyar Kunningarstova**
210 Sandur
www.visitsandoy.fo
tlf. 361836
Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 13-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**80 ár**
Fríggjadagin 22. februar verður Kristina Jacobsen, Undir Kráarbrekku 10, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Sjómansheiminum kl. 18.